## Ingibjørg nummar fimm

*Ingibjørg Poulsen endaði á einum fimtaplássi í kúluvarpi fyri kvinnur mánadagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í kúluvarpi fyri kvinnur her á oyggjaleikunum, var finalan avgreidd seinnapartin mánadagin.

Ingibjørg Poulsen umboðaði Føroyar í kúluvarpi, og endaði hon á einum samlaðum fimta plássi. Úrslitið hjá henni gjørdist 10,38.

**-ib**

## Nummar fimm á 10 km

*Borgarhjørt Holm stríddist leingi um fjórða plásisø á 10.000 teininum*

Borgarhjørt Holm var einsamøll føroysk kvinna, tá 10.000 metrarnir stóðu á skránni týsdagin.

Ætlandi skuldi Rigmor N. Arge eisini taka lut í hesi kappingini, men hon hevur ein minni skaða at dragast við, og tí varð ikki ráðiligt, at hon skuldi renna bæði á hesum og á hálva marathon-teininum.

Borgarhjørt rann teinin í tíðini, 39.01,6 og rakk hetta til eitt fimta pláss. Eitt langt skifti var Borgarhjørt annars á fjórða plássinum, men nakað eftir teir fimm kilometrarnir varð hon yvirhálað av einari av Alderney.

**-jm**

*- Sum oftast havi eg sjálvur togað meg eitt sindur óvæntað upp, men nú gekk tað so ikki, segði Heri Ziska eftir fjórða plássið í sleggjuvarpinum*

# Heri uttan heiðursmerki

**Paul Farley av Isle of Wight leyp um bukk á talvuni, tá hann betraði persónliga metið við seks metrum**

SLEGGJUVARP
*Álvur/Jákup*

Ein av teimum, sum vanliga plagar at vera við heilt har frammi, tá heiðursmerki skulu handast, er Heri Ziska. Har eru tað sleggjuvarpið og diskoskastið, sum plaga at kasta nakað av sær, og mánadagurin var so dagurin, tá sleggjan skuldi varpast úteftir.

### Snýttir av Farley

Undan kappingini varð mett, at Heri helst skuldi stríðast um bronsuna við fyrst og fremst Paul Farley av Isle of Wight. Andy Frost at Isle of Wight er vanliga somikið einaráðandi, at hann mest sum uttan at ómaka sær tekur sær av gullinum, meðan tað skuldi liggja heilt væl fyri, um Heri skuldi fara at dystast við Gustafsson av Gotlandi, sum varð mettur sum upplagdur silvurvinnari.

Og í kappingini var tað alla tíðina so, at Heri var við í stríðnum um bronsuna. Tað óvæntaða var, at hetta var í dysti við Gustafsson. Farley, sum ongan tíð áður er farin upp um teir 44 metrarnar, tveitti alt fyri eitt sleggjuna út á 50 metrar, og hetta rakk til silvurmerkið. Gullið tók Frost sær av í tí heilt stóra stilinum. Eitt kast hjá honum miseydnaðist, tá sleggjan endaði uttan fyri kastibreytina, men annars varð nýtt Oyl-met sett fyri hvørt kastið. Tað seinasta og longsta heilt úti á 65,82 metrum.

Heri var fyri tað mesta at finna á fjórða plássinum, men í næst seinasta kastinum kom hann út á 46,67 metrar. Hansara longsta kast í fýra ár, og tá hetta samstundis var 10 sentimetrar meira enn Gustafsson, var bronsan nú í hond. Her var hon so fram til seinasta kastið hjá gotlendinginum, sum ripaði sleggjuna beint út um 48 metrar, og so stóð greitt, at talan gjørdist ikki um heiðursmerki hjá Hera.

### Mítt tørn

Tað í sjálvum sær er sjálvandi eitt afturstig, nú hann hevur gjørt tað til mest sum ein vana at hava metal heim við sær aftur, men sjálvur lat Heri tó ikki heilt so illa at eftir kappingina.

- Sjálvandi er tað keðiligt, tá man ikki fær heiðursmerki, men hinvegin kann eg heldur ikki vera heilt ónøgdur. Eg kastaði jú tað besta kastið, sum eg havi havt í fýra ár, og undir vanligum umstøðum vildi hetta eisini verið nóg mikið. Men Farley snýtti okkum. Hann betraði seg sjálvan við yvir seks metrum, og tað er jú einastandandi flott. Kanska er tað eisini bara tað, at tað nú var mín túrur at verða snýttur. Sum oftast havi eg sjálvur togað meg eitt sindur óvæntað upp, men nú gekk tað so ikki.

Men tú vart jú á bronsuplássinum undan seinasta kastinum hjá Gustafsson. Er tað ikki eitt sindur hugstoytt at missa somikið seint í kappingini.

- Tað er tað kanska. Men Gustafsson er javnan oman fyri teir 50 metrarnar, so eg hevði alla tíðina ein varhuga av, at hann fór longur upp, men tað rakk so bara til bronsuna hjá honum.

### Fer eftir gullinum

Eftir sleggjuvarpið er nú bara kringlan – ella diskos – eftir hjá Hera. Her eru møguleikarnir fyri heiðursmerki av tí heilt fina slagnum nokk eisini betri enn í sleggjuvarpinum, og Heri dylur ikki fyri, at hann fer eftir tí besta.

- Eg fari eftir gullinum. Tað er so einki at ivast í. Men tá tað er sagt, so skal eisini leggjast afturat, har kann mest sum alt henda. Sjálvur kasti eg alt ov óstøðugt í løtuni, tí ein skaði hevur noytt meg at broyta teknikk, og so leingi sum hesin ikki er finpussaður, so svinga úrslitini millum tað heilt góða og tað vánaliga. So mugu vit bara vóna, at tað verður tað góða lagið hesaferð, og eg havi tað vanliga so, at besta kastið á árinum kemur á oyggjaleikunum, so hvør veit, segði Heri Ziska at enda.

## Evald í finaluna

Føroyski rennarin, Evald við Garð, tryggjaði sær seinnapartin mánadagin pláss í finaluni í 800 metra renning fyri menn.

Henda finalan varð avgreidd seinnapartin í gjár, týsdag, so vit megnaðu ikki at fáa hetta við innan evsta mark var farið.

Evald, sum rann í geil nummar sjey, endaði á einum fjórða plássi við tíðini 2,02.46 minuttir.



Isle of Wight-Føroyar 0-11 (0-4):

# Við fullari ferð

**Bólkaspælið tykist bert at vera ein avgreiðsluspurningur hjá Føroyum, sum eftir øllum at døma skulu dystast við Gotland um gullið**

FÓTBÓLTUR
*Álvur/Jákup*

**Guernsey:** Næsti dysturin hjá føroyska kvinnulandsliðnum í fótbólti var á skránni mánakvøldið, tá Isle of Wight stóðu fyri skotum.

Tað var lítið at ivast í, at Føroyar vóru risa favorittar at vinna dystin, og tó at venjarin hevði nýtt høvið at gera fleiri útskiftingar á liðnum, so høvdu okkara lítlar og ongar trupulleikar av at vinna ein sannførandi sigur.

Fyrri hálvleikur var kanska dekan ov trilvandi, og til tíðir var spælið rættiliga óskipað í royndunum at fáa so nógv mál sum gjørligt, men hóast hetta, so var alla tíðina talan um eitt støðugt trýst omaneftir.

Hesum megnaðu tær av hvat Gotland hevur at ímóti, og tó at tað gekst heldur striltið, eftir Halltóra eftir góðum minutti hevði langað bóltin inn, so var ongan tíð vandi á ferð hinvegin.

### Helst Gotland

Føroyska liðið hevur nú bert ein dyst eftir í bólkaspælinum, áðrenn farið verður til hálvfinalurnar. Í seinasta dystinum skulu Føroyar hitta Jersey, sum somuleiðis hevur seks stig fyri tveir dystir, men sigrarnir hjá teimum hava als ikki verið eins sannførandi sum okkara, og her á staðnum ivast fáur í, at Føroyar eisini fara at fáa fult fyri tann dystin.

Í hálvfinaluni verður mótstøðan av antin Gotlandi ella Guernsey. Hesi bæði liðini hava vunnið tveir dystir hvør, men skal metast eftir úrslitunum, so verður tað helst Gotland. Tær hava á sama hátt sum Føroyar vunnið nakrar sera sannførandi sigrar, meðan Guernsey meira at kalla hevur strítt seg til sigrarnar.

Og spurningurin er so, bjóða. Fyri tveimum árum síðani gjørdist talan um sannan gysara í finaluni, tá mótstøðan var av Álandi, og er Gotlan á leið á sama støði sum hesar, so verður talan um eina sera trupla uppgávu hjá føroyska liðnum. Men fyrst skal plássið í finaluni vinnast, og tað gerst best við tveimum sigrum afturat.

### Dysturin í tølum

**Isle of Wight-Føroyar 0-11 (0-4)**
0-1: Halltóra Joensen
0-2: Eyðvør úr Dímun
0-3: Rannvá Andreasen
0-4: Halltóra Joensen
0-5: Sólva Joensen
0-6: Halltóra Joensen
0-7: Malena Josephsen
0-8: Halltóra Joensen
0-9: Eyðvør úr Dímun
0-10: Eyðvør úr Dímun
0-11: Heidi Heinesen

**Føroyar:** Randi Wardum – Kristina D. Simonsen, Bára Skaale, Silja á Borg, Annelisa Justesen – Sólvá Joensen, Eyðvør úr Dímun, Rannvá Andreasen, Eyðfríð Kristiansen – Ása Dam á Neystabø, Halltóra Joensen

*Heldur ikki Isle of Wight megnaði at geva Føroyum nevnivert av mótstøðu, og annan dagin á rað gjørdist talan um 11-0 sigur til føroyska liðið*

Føroyar-Caymann 3-0 (25-15, 25-17, 25-17) & Føroyar Grønland 3-0 (25-12, 25-19, 25-17):

# Halda beina kós móti oddasessinum

**Har var eingin slingur í valsinum hjá mansliðnum í flogbólti, tá teir mánadagin høvdu tveir dystir á skránni**

FLOGBÓLTUR
*Álvur/Jákup*

Eftir harða dystin móti Álandi sunnudagin, var tað at kalla meira gerandisdagur hjá føroysku flogbóltsharrunum mánadagin. Tveir dystir vóru á skránni móti ávíkavist Caymann og Grønlandi, og fyrst og fremst ráddi bara um at fáa neyðugu sigrarnar, soleiðis at oddasessurin í bólkinum kundi varðveitast.

*Føroyingarnir høvdu ikki stórvegis trupulleikar av Grønlandi, og tað taldi avgjørt eisini rætta vegin, at onkur av stuðulsleikarunum fekk dagin at hvíla seg í*

### Ruddiligt

Og talan gjørdist eisini um tveir ruddiligar sigrar. Beint eftir døgurða var tað Caymann, sum stóð fyri skotum. Caymann er annars eitt av liðunum, sum hevur tikið seg nógv fram seinnu leikirnar, og ikki minst er tað undirhaldandi at síggja, tá teir í smashunum geva seg at kalla 100% hvørja tí einastu ferð. Einki við at ein bóltur kann leggjast í tómt øki ella liknandi. Har skal snøgt sagt bara power á.

Trupulleikin hjá teimum er so, at teir at kalla einki vápn hava, og hetta dugdu føroyingarnir til fulnar at gera sær dælt av. Spælið hjá okkara var munandi breiðari enn hjá mótstøðuni, og tað tók heldur ikki liðnum meira enn góðan tíma, so var sigurin fingin til høldar.

Seinni dysturin var so ímóti Grønlandi, og heldur ikki her var stórvegis at rafla um. Venjarin kundi enntá loyva sær tað luxus at senda fleiri av minni royndu leikarunum í dyst. Bæði fyri at geva hesum neyðugu royndirnar, men sjálvandi eisini fyri at spara teir, sum kunnu væntast at fáa avgerandi leiklutir seinni.

Úrslitið av dystinum talaði eisini fyri seg. Føroyar vunnu ein tryggan 3-0 sigur, og tað sigur kanska heldur ikki so lítið, at hesir báðir dystirnir tilsamans tóku minni tí enn gysarin móti Álandi gjørdi sunnudagin.

Serliga høvdu grønlendingarnir ilt við at sleppa fram við føroyska blokkinum, tá smashini vórðu latin avstað, og tó at føroyingar í fleiri førum høvdu hug at satsa ov nógv, so var tað fløvandi at síggja, at álopsspælið eisini kann vera ágangandi, hóast Rúni Weihe situr á beinkinum og hvílir seg nakað.

### Gotland ella Bermuda

Enn er bólkaspælið í flogbóltinum ikki heilt liðugt, men við fullum stigatali eftir trimum dystum skal vilja heilt illa til, um føroyingarnir ikki vinna bólkin. Til hetta krevst ein sigur í seinasta dystinum, sum verður ímóti stigaleysa Jersey.

Hinvegin tykist spenningurin vera stórur um, hvat mótstøðulið føroyingarnir skulu fáa í hálvfinaluni. Her varð annars rokna við, at tað skuldi gerast Gotland, at hesir høvdu tapt fyri Saaremaa, men síðani er Bermuda av álvara farið at gera um seg. Fyrsta dystin taptu teir annars greitt fyri Saaremaa, men síðani hava teir bara vunnið, og saman við Gotlandi hava teir fýra stig fyri tríggjar dystir.

Avgerandi dysturin teirra millum skuldi leikast týsdagin, og verður tað vinnarin her, sum eftir øllum at døma skal royna seg ímóti Føroyum í hálvfinaluni.